

### Hann ætlar sær heimaftur

Fyrrverandi forsetin í Haiti, Jean-Bertrand Aristide, sum bleiv rikin frá valdinum fyri trimum árum síðani, hevur búð í Suðurafrika seinastu árini, men nú sigur hann, at hann ætlar sær heimaftur.

Í samrøðu við suðurafrikanska útvarpið sigur Aristide, at hann væntar at sleppa heimaftur, nú nú fyrrverandi samstarvsfelagi hansara René Préval er vorðin forseti í Haiti. Préval vann forsetavalið fyrr í hesum mánaðinum, og hann hevur sagt, at hann hevur einki ímóti, at gamli forsetin kemur heimaftur.

Aristide sigur við suðurafrikanska útvarpið, at hann ætlar sær at tosa við Préval og ST, áðrenn hann fer aftur til Haiti, tí hann ætlar sær ikki at koma aftur sum tjóvur á nátt. Eygleiðarar siga, at gamli forsetin er framvegis sera væl umtóktur ímillum tey nógvu fátæku í heimlandinum, sum uttan iva vilja hava hann aftur í forsetaembætið. Men Aristide sigur, at hann ætlar sær at virka saman við teimum, sum vilja tryggja frið í Haiti.

Tá hann noyddist av landinum í februar í 2004, vildi Aristide vera við, at USA hevði givið boð um at reka seg í útlegd, men tað avsannaði amerikanska stjórnin

### ES-útvarp til Hvítarusslands

Frá sunnudegnum sleppa fólk í Hvítarusslandi at hoyra onnur tíðindi enn tey í landsins almenna útvarpi.

Tá fer ES at senda útvarpstíðindi inn um hvítarussiska markið, og ætlan er, at ES eisini skal senda sjónvarpstíðindi ymsar sjónvarpssendingar sama veg seinni. ES dylur ikki fyri, at tað er ikki av tilvild, at útvarpstíðindini til Hvítarusslands byrja júst nú, men at tey hava samband við tjóðartingsvalið í Hvítarusslandi tann 17 mai.

Forsetin í Hvítarusslandi, Aleksander Lukasjenko, ið vanliga verður umrøddur sum tann seinasti einaræðisharrin í Evropa, hevur ræðið á øllum fjølmiðlunum í landinum. Fleiri fjølmiðlafólk, sum hava vent sær ímóti forsetanum, hava fingið harða revsing, og summi eru funnin myrd.

### Kristin drepa muslimar

Tey kristnu í Nigeria bera ótta fyri hevndarálopum, eftir at kristin harkalið hava beint fyri meiri enn hundrað muslimum har suðuri í landinum. Ein borgararættindafelagsskapur sigur, at mikudagin beindu tey kristnu harkaliðini fyri meiri enn 20 muslimum, og hósdagin lógu onnur 80 eftirá. Felagsskapurinm sigur, at kristnir ungdómar hava gjørt seg inn á fleiri moskur, og at teir eru eirindaleysir í sínari framferð.

Tey kristnu eru í meiriluta har suðuri í Nigeria, men fleiri túsund kristin búgva eisini har norðuri í landinum, har muslimarnir eru í meiriluta. Nú bera tey kristnu har ótta fyri hevndarálopum, og teir seinastu dagarnar hava nógv kristin leitað sær skjól á herstøðum fyri at tryggja seg ímóti hevnd.

Emn hevur Olusegun Obasanjo, forseti, sum er kristin, ikki givið løgregluni ella herinum boð um at leggja uppí.

### Nógvar bøtur

Talið á donskum bilførarum, sum fáa bót fyri at koyra ov skjótt, er tvífaldað tey bæði seinastu árini.

Í fjør komu 356.076 bilførarar í svørtubók hjá løgregluni, tí teir koyrdu skjótari, enn loyvt var, og tað var meiri enn tvær ferðir so nógv sum árið fyri.

Sambært løgregluni er tað tann góða tøknin, sum ger, at fleiri fáa bót, og serliga tær sokallaðu ferðfellurnar hava víst seg at rigga væl. Í fjør fingu 293.000 bilførarar bót eftir at vera farnir í ferðfellurnar.

# Blóðug hevnd kann enda við borgarakríggi í Irak



*Vápnaðir shiamuslimar í gøtunum í Bagdad krevja hevnd fyri álopið á halgidómin í Samarra.*

**Álopið á shiamuslimska halgidómin í Samarra og tey shiamuslimsku hevndarálopini kunndu elva til veruligt borgarakríggj í Irak. Politiska tilgongdin er eisini steðgað.**

IRAK

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Síðani innrásina hava sunnimuslimskir yvirgangsmenn við al-Zaeqawi á odda skipað fyri ófriði í Irak, men nú er støðan broytt. Síðani vápnaðir menn við gekkaskorti lupu á shiamuslimska halgidómin í Samarra mikudagin, hava shiamuslimarnir tikið vápnini fram, og teir báðar seinastu dagarnar hava teir myrt einar 150 sunnimuslimar.

Við øðrum orðum er talan um bardagar ímillum teir báðar átrúnaðarbólkarnar, og eygleiðarar ávara um, at tað kann enda við veruligum borgarakríggi. Serfrøðingar siga, at í veruleikanum hevur tað prutlað undir lokinum líka síðani tjóðartingsvalið tann 15. desember, og at álopið á halgidómin var dropin, sum fekk bikarið at flóta yvir.

Bardagarnir eru eisini eitt álvarssamt bakkast fyri ta politisku skipanina í Irak, sum fekk ein dyggan smeit, tá tann sunnimuslimski flokkurin í gjár kunngjørdi, at hann tók seg burtur úr samráðingunum um at skipa eina samgongustjórn.

Valið í desember vísti, at nógv tey flestu atkvøddu eftir teirra átrúnaðarligu sannføring heldur enn nakrari politiskari sannføring. Støðan ímillum teir báðar bólkarnar var eisini spent undir Saddam Hussein, men stýrið megnaði at halda spenninginum niðri. Bardagarnir nú vísa, at tað megnar tað nýggja stýrið ikki. Harafturat kemur, at tann sunnumuslimski minnilutin, sum hevði valdið, tá Saddam ráddi, hevur ilt við at góðtaka, at hann fær lítla ella kanska onga ávirkan nú, og ein meiningakanning herfyri avdúkaði eisini, at 90 prosent av sunnimuslimunum virða ikki eina shiamuslimska stjórn.

At veljararnir valdu eftir átrúnaðarligari sannføring ella etniskum sambandi ger, at altsamt fleiri stúra fyri, at landið verður býtt í trý, og at tað verða sunnimuslimarnir, sum verða fyri vanbýti, tí at kalla øll oljan er í teimum shiamuslimsku og kurdisku økjunum.

Jalal Talabani, forseti, segði í gjár, at herurin og løgreglan høvdu fingið til uppgávu at steðga ófriðinum, og útigongubann varð lýst í Bagdad og fleiri øðrum býum. Kortini hildu bardagarnir fram.

Eingin veit við vissu, hvør tað var, sum søkti at shiamuslimska halgidóminum í Samarra, men shiamuslimarnir ivast ikki í, at tað vóru sunnimuslimar. Tað skuldi hevnast. Norðan fyri Bagdad vórðu bussar við 47 sunnimuslimskum arbeiðsmonnum steðgaðir og allir menninir skotnir. Aðrastaðni fann løgreglan myrdar sunnimuslimar fram við vegjaðaranum, og nógvastaðni sóust brendir bilar við uppkolaðum líkum í.

Samstundis gingu hundraðtúsundtals shiamuslimar í gøtunum og kravdu hevnd. Fleiri teirra høvdu maskinbyrsur og skutu upp í loft, so gøtumyndin minti um Gaza, skrivar Reuters.

Eygleiðarar siga, at ófriðurin kemur USA stak illa við. Amerikanska stjórnin vil fegin taka sínar 130.000 hermenn úr Irak, so skjótt irakar sjálvir kunnu átaka sær at skipa fyri lóg og landaskili. Men vánirnar fyri tí eru ringar í løtuni, og ófriðurin kann hava við sær, at teir amerikonsku hermenninir verða verandi nógv longri enn ætlað.

# Sleppur ikki til Moskva

**Slobodan Milosevic sleppur ikki til Moskva at søkja sær heilsubót.**

RÆTTARMÁL

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Krígsbrotsmannadómstólur in fyri gamla Jugoslavia vil ikki lata fyrrverandi jugoslaviska forsetan Slobodan Milosevic sleppa til Russlands til læknakanningar.

Milosevic líður av hjartatrupulleikum og ov høgum blóðtrýsti, og hann bað herfyri um at sleppa til læknakanningar í Moskva, men dómstólurin sigur, at tær kanningarnar kunnu læknar í Niðurlondum gera. Tí sleppur Milosevic ongan veg.

Eygleiðarar í Haag siga, at dómstólurin ber ótta fyri, at Milosevic kemur ikki aftur, sleppur hann til russiska høvuðsstaðin, har kona hansara og sonurin búgva.

Milosevic er ákærdur fyri krígsbrotsverk og brotsverk ímóti mannaættini undir borgarakrígnum í gamla Jugoslavia. Rættarmálið byrjaði í 2002 og verður eftir ætlanini li_ugt seinni í ár. Verður gamli forsetin funnin sekur, kann hann fáa lívlanga fongsulsrevsing.